


www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 08 - 2013

# Greinarar ósamdir um oljuprísin

Tríggjar norskar greinarafyritøkur, sum javnan gera metingar av oljuprísinum, eru rættiliga ósamdar um framtíðar oljuprísin. Pareto roknar við høgum oljuprísi komandi árini, men tað eru DNB og Nordea Markets ikki samd í, skrivar Hegnar Online. ? Pareto Securitites - Equity Research legði í gjár fram eina nýggja frágreiðing um oljuprísin komandi árini. Høvuðsniðurstøðan er tann, at útbjóðing og eftirspurningur fara at økjast komandi fimm árini, og at oljuprísurin fer at nærkast 120 dollarum ftyri tunnuna sambært dn.no. Hesum er kendi oljugreinarin Torbjørn Kjus í DNB Markets heilt ásamdur í. Tað nyttar ikki at brúka gomul modell. Sambandið, sum hevur verið millum búskaparligan vøkstur og eftirspurning seinastu 25 árini, dugur ikki longur, sigur hann Hann hevur spátt, at oljuprísurin, sum í dag er umleið 110 dollarar tunnuna, fer at lækka longu í ár. Og síðani fer hann at lækka munandi fram til 2020. Heldur ikki oljugreinarin hjá Nordea Markets, Thina Margrethe Saltvedt, roknar við einum høgum oljuprísi. Pareto eru nokk eitt sindur meira bjartskygt enn eg eri um tey komandi tvey árini, sigur hon.